

*SIT 1 **hárfríðkarar** f.v.: Ada Joensen, Tórshavn, Anna M.K.A. Abelsen, Haldarsvík, Ingibjørg Mohr Arnadóttir, Tórshavn, Leika Samuelsen, Sørvágur, og Lydia Jensen Samson, Klaksvík*



*SIT **kosmetikarar** f.v.: Guðrun Jacobsen, Sørvágur, Johild Kallsgarð Joensen, Klaksvík, og Poula í Frammistovu, Hvannasund*



*SIT 1 **klædnahandverkarar** f.v.: Aleth J. Wang Jacobsen, Miðvágur, Alisa A. Hentze, Saltangará, Elesbeth H. í Gong, Tórshavn, Filip Morera Mortensen, Tórshavn, Jóhanna Matilda Vidtfeldt, Sandur, og Milja Hanusardóttir, Tórshavn*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jónsvein Isaksen,** ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Keypmannahavn, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum mánadagin 30. juni, 55 ára gamal.

**Aleksandra Hammer,** ættað av Tvøroyri, búsitandi í Vági, andaðist sunnudagin á Tvøroyar sjúkrahúsi, 90 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Tvøroyar sjúkrahúsi hóskvøldið. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju fríggjadagin klokkan 14.

## Dagurin

**3. juli. Kornelius.** Mong eru halgimenni, sum bera navnið Kornelius, men teir vita ikki við vissu, hvør hesin er. Summir halda, at talan er um pávan Kornelius, sum varð tikin av døgum ár 253. Aðrir siga, at sipað verður til høvuðsmannin Kornelius, sum var fyrsti heidningur, ið var doyptur. Ápostlasøgan kap. 10. Navnið er latínskt ið kemur av orðinum cornu, ið merkir horn.


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum gleddu okkum á krúndiamant brúðleypsdegi okkara 10. apríl 2008. Takk fyri gávur, blómur og fjarrit, og takk til tykkum mongu, sum komu í bygdarhúsið í Leirvík at heilsa uppá, og verða saman við okkum hetta kvøld. Harrin signi tykkum øll.

**Heilsan**
**Elly og Eivind Niclasen, Klaksvík**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga kransar, blómur og heilsanir í sambandi við kórsetingina hjá

**Jens Cramer,**
Århus.

**Malan Marnersdóttir og Cecilie Cramer**